VINNUSÍÐURNAR
BLAÐIÐ við føroysku VINNU tíðindunum

Nr. 57 - 21. mars 2006



*Nevndin í Atlantic Petroleum øll hesi seinastu árini varð afturvald. Har sita Peter Even Djurhuus, Kjartan Hoydal, Óli Hammer, Poul Mohr, Wilhelm Petersen, stjóri, og Mortan Johannesen*
*Mynd Jan Müller*

# Atlantic Petroleum vil vera fremsta óhefta oljufelagið í Føroyum

**Hóast eitt hall upp á knappar 10 mió. kr. í fjør, so stevnir føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum móti eini spennandi framtíð við oljuframleiðslu í enskum øki longu í komandi ári umframt leiting á føroyska landgrunninum. Wilhelm Petersen, stjóri er sannførdur um, at tað var ein røtt avgerð at fara á virðisbrævamarknaðin og staðfestir hann, at Atlantic Petroleum við sínum umleið 100 mió. kr. í egin-peningi og einum virði á virðisbrævamarknaðinum uppá góða hálva mia. kr. telist millum størstu fyritøkur í Føroyum í dag.**

AÐALFUNDUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Føroyska oljufelagið ”Atlantic Petroleum” hevði aðalfund í Havn leygardagin. Har var roknskapurin góðkendur og nevndin afturvald. Í nevndini sita Kjartan Hoydal, formaður, Poul Mohr, Mortan Johannesen, Óli Hammer og Peter Even Djurhuus. Stjóri í felagnum er Wilhelm Petersen.

Hetta er áttandi aðalfundurin hjá felagnum og tann fyrsti síðani felagið varð skrásett á virðisbrævamarknaðinum. Úrslitið hjá felagnum fyri 2005 varð eitt hall uppá 9.8 mill. kr, og kemur hetta ikki óvart á, tí felagið hevur gjørt stórar íløgur við tí fyri eygað at fáa inntøkur í næstu framtíð, eitt nú frá oljuframleiðslu í bretskum øki.

Hallið var nakað hægri enn mett við endan á 3. ársfjórðingi 2005. Orsøkin er, at felagið hevur niðurskrivað íløgurnar í loyvum á enskum øki, uppá íalt 5,6 mió. kr. Um sæð verður burtur frá niðurskrivingini varð hallið av rakstri felagsins 4,1 mió. kr., sum er lægri enn væntað. Leiðsla felagsins metir úrslitið at vera nøktandi, um hugsað verður um, at felagið er undir menning. Í ársfrágreiðingini verður upplýst, at Atlantic Petroleum hevur málrættaðar ætlanir um at gerast fremsta óhefta oljufelagið í Føroyum og skal hetta endamál røkkast við at vera fíggjarliga sterkt og væl rikið, við góðum umdømi uttanlands og við førleika at geva partaeigarum eitt gott avkast.

## Spennandi framtíð

Langtíðar mál felagsins eru oljuleiting í føroyskum øki, oljuleiting í enskum øki og keyp av ognarpørtum í framleiðandi økjum. Og higartil hevur henda ætlan víst seg at givið góð úrslit stendur í ársfrágreiðingini. M.a. luttekur felagið í fýra føroyskum leitiloyvum og seks loyvum í enskum øki.

Um framtíðarútlitini verður sagt, at virksemið hjá Atlantic Petroleum í 2006 verður væntandi væl størri enn undanfarin ár. Verulig gongd fer ætlandi at koma á útbyggingarnar av Chestnut og Ettrick, eins og Perth skal búgvast út til útbyggingar. Støða verður eisini tikin til, hvussu víðari skal farast fram við West Lennox fundinum í 2006. Felagið er so eisini við í tí sera spennandi boringini á Brugdumiðinum á føroyska landgrunninum í summar. Hesin brunnur kann fáa stóran týdning fyri menning av teimum báðum loyvunum, sum AP fekk tillutað í 2. útbjóðing. Felagið fer so eisini framhaldandi at troyta møguleikarnar fyri at keypa seg inn í leiti-, útbyggingar- og framleiðsluloyvi. Atlantic Petroleum kannar so eisini møguleikarnar fyri at yvirtaka verandi smærri oljufeløg fyrst og fremst í Bretlandi men eisini í Noregi og Danmark.

Arbeitt hevur alla tíðina verið við at menna felagið, bæði við innanhýsis mannagongdum og arbeiðshættum annars fyri m.a. at lúka tey krøv, ið verða sett til feløg, sum eru skrásett á einum virðisbrævamarknaði. Umsiting felagsins verður víðkað sohvørt tørvur er á tí. Nú felagið er farið undir at útbyggja oljuleiðir er avgjørt at keypa tekniska vitan frá uttanveltaðum veitarum.

## 3000 eigarar

Wilhelm Petersen, stjóri í felagnum sigur seg vera væl nøgdan við gongdina higartil. Hann setir stórar vónir til boringina á landgrunninum í summar og heldur fyri, at fer hon at geva eitt positivt úrslit, kann tað skunda undir kanningarnar av báðum loyvunum hjá felagnum í føroyskum øki. Í dag eru umleið 3000 partaeigarar í Atlantic Petroleum, sum tí av røttum kann kallast fólksins oljufelag. Tað er heldur ikki óhugsandi, at felagið fer at lata upp fyri at tekna nýggj partabrøv í framtíðini. Tað veldst so eisini um framtíðar gongdina. Wilhelm Petersen er sannførdur um, at tað var ein røtt avgerð at fara á virðisbrævamarknaðin og staðfestir hann, at Atlantic Petroleum við sínum umleið 100 mió. kr. í eginpeningi og einum virði á virðisbrævamarknaðinum uppá góða hálva mia. kr. og telist millum størstu fyritøkur í Føroyum í dag.



*Teitur Samuelsen og Fía Petersen eru partur av manningini á skrivstovuni í Havn*

# Atlantic Petroleum sera góðar vakstrarmøguleikar

**– Vit síggja á gongdini higartil, at Atlantic Petroleum hevur ótrúliga góðar vakstrarmøguleikar. Í dag er felagið eitt av teimum størstu partafeløgunum í virði í Føroyum staðfestir ein nøgdur Wilhelm Petersen, sum sær fram til boring á landgrunninum í summar og framleiðslu í enskum øki komandi tvey árini**

AÐALFUNDUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum heldur felagið gongur eini bjartari framtíð á møti*
*Mynd Jan Müller*

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum hevði aðalfund leygardagin. Tá hugsað verður um stóra eigarskaran var uppmøtingin ikki nakað serlig. Wilhelm Petersen sær tó ikkki hetta sum nakran trupulleikam, tí fundurin gekk væl. Hann vísir á, at fólk í dg kunnu alla tíðina fylgja við á heimasíðuni, har felagið alla tíðina kunnar um gongdina í felagnum og her ikki minst um støðuna á virðisbrævamarknaðinum.

Stjórin er annars nøgdur við úrslitið og gongdina. Ætlaninar halda rættiliga væl. Tvey oljufelt á enskum øki, sum felagið er við í verða nú bygd út og farið verður undir framleiðslu í 2007 og 2008. So sjálvt um felagið hevði eitt rakstrarhall, var tað nakað, roknað varð við, nú felagið ger íløgur og harvið mennir seg. Hóast eitt hall uppá góðar 9 mió. kr. er úrslitið kortini nøktandi sigur Wilhelm Petersen.

Eginkapitalurin er góðar 100 mió. kr. Men talan er samtíðis um eitt marknaðarvirði uppá 500 mió. kr, so partaeigararnir hava fingið eina munagóða forretning av tí kapitali, sum er settur í felagið. Atlantic Petroleum hevur í dag 3000 íleggjarar, serstakliga føroyingar. Tað er hugsandi í tann mun felagið veksur um sítt virksemi, at eginkapitalurin eisini verður hækkaður. Tað verður gjørt, tá tað er neyðugt. Og tað er ikki ósannlíkt, at tað verður gjørt í ár sigur Wilhelm Petersen, nú felagið er átta ára gamalt.

### Góða byrjanin alt at siga

Orsøkin til at tað hevur gingist felagnum væl heldur stjórin fyrst og fremst vera tað góða arbeiði, sum varð gjørt í byrjanini, tá tað fekk lut í oljusamtaki í 1. útbjóðing við Amerada Hess á odda. Tá fekk felagið atgongd til tey fólkini, sum nú mynda oljuverðina. Uttan tað hevði hetta ikki latið seg gjørt. Tað skapti grundarlag fyri at byggja upp eitt netverk úti í heimi, sum felagið í dag ikki kann vera fyriuttan. Í dag hevur Atlantic Petroleum eisini nógv tað størsta virksemið uttanfyri Føroyar. Tað arbeiða fýra fólk í Føroyum og trý í Onglandi. Haraftrat eru 10 til 20 fólk, sum felagið tí. Dótturfelagið í Onglandi eitur Atlantic Petroleum UK. Har er so eisini Richard Hardmann, fyrrverandi stjóri hjá Amerada Hess, partur av nevndini.

Atlantic Petroleum fekk lut í tveimum loyvum í 2. útbjóðing í Føroyum. Frammanundan er tað so partur av samtaki frá 1. útbjóðing. Tað er í hesum sambandi, at felagið nú er við í tí spennandi Brugdubrunninum, sum verður boraður í summar.

Virksemið hjá felagnum fer at økjast munandi komandi árini bæði í føroyska og enska økinum. Felagið hevur vónir um komandi 3-5 árini at kunna keypa upp onnur smærri feløg umframt at vera við í útbyggingum í bretskum øki.

### Staðið seg væl á virðisbrævamarknaði

Atlantic Petroleum varð skrásett á virðisbrævamarknaðinum í juni mánað í fjør, og hetta eru tey rættiliga væl nøgd við sigur Wilhelm Petersen. Partabrævini hava klárað seg væl og nakað av tí frægasta á tí íslendska marknaðinum. Fyrimunurin við at vera á virðisbrævamarknaðinum er m.a. tann, at íleggjarin kann sjálvur velja, um hann vil varðveita síni partabrøv ella hann vil selja og harvið fáa vinningin í hús. Fyri felagið sjálvt er fyrimurin tann, at tað tann vegin kann fáa atgongd til kapital, um felagið hevur vakstrarmøguleikar. – Vit síggja á gongdini higartil, at Atlantic Petroleum hevur ótrúliga góðar vakstrarmøguleikar. Í dag er felagið eitt av teimum størstu partafeløgunum í virði í Føroyum. Tað er eisini sera góð spjaðing, tá hugsað verður um ognarviðurskiftini í felagnum. Wilhelm Petersen leggur aftratt, at felagið er í tí serstøðu, at tá tað varð stovnað í februar 1998, eydnaðist tað at fáa tann føroyska stórkapitalin at savna seg um eitt felag, og hetta hevur alla tíðina verið styrkin hjá felagnum.

### Raðfesting

– Tað eydnaðist tykkum ikki at gerast partur av einum størri samtaki, tá 2. útbjóðing varð á føroyskum øki. Var hetta ikki ætlanin, ella vóru tit verið ov seinir á sjóvarfallinum og er hetta ikki nakað, sum kann darva felagið og tess framtíðar møguleikum?

– Tað hendi so nógv í felagnum, tá 2. útbjóðing varð fyrireikað, eitt nú vóru vit tá í gongd við at keypa okkum inn í fleiri oljufelt í bretskum øki. So tað var ein raðfesting vit tá gjørdu. Nevndin hevur alla tíðina havt tað greiða málið at fáa inntøkur til felagið skjótast møguligt tvs. at fáa fatur á aktivum, sum kunnu geva pengar av sær. Í Føroyum er tað framvegis bert talan um leiting. Wilhelm Petersen leggur dent á, at úrslitið av 2. útbjóðing í Føroyum varð avgjørt nøktandi fyri Atlantic Petroleum. Teir samstarva við Geysir Petroleum, sum hevur drúgvar royndir í oljuleiting. Talan er um nøkur av oddafólkunum í tí fyrrverandi norska oljufelagnum Saga Petroleum, sum var eitt av teimum fyrstu oljufeløgunum, sum á sinni góðu føroysku undirgrundini gætur. Wilhelm Petersen sigur, at teir nú fyrireika seg uppá at gera seismiskar kanningar. Hann leggur aftrat, at framtíðin goymir nógvar møguleikar á landgrunninum. Umframt at gera egin loyvi búgvin til leiting, so er tað ikki ókent, at feløg kunnu "farma" inn í loyvi, tvs. keypa seg inn í loyvi hjá øðrum ella lata onnur keypa seg inn í egin loyvi. Tað er so eisini ein gongd, sum føroyska oljufelagið fylgir væl við í.

Oljan kærkomin:

## Gott við fjøltáttaðum búskapi



*Wilhelm Petersen, stjóri:*
*– Tað eru vit sjálvi, sum skulu stýra oljutilgongdini*
*Mynd Jan Müller*

Wilhelm Petersen hevur verið stjóri í Atlantic Petroleum, síðani tað var stovnað fyri átta árum síðani. Hóast hesi "mongu" ár uttan lønandi fund ella framleiðslu, so metir hann kortini, at felagið gongur eini bjartari framtíð á møti. Um so er at olja verður funnin í Brugdubrunninum í summar, fer hetta at fáa kolveltandi avleiðingar fyri bæði felagið og fyri alt samfelagið. – Sum eg síggi tað fer samfelagið eisini at broytast grundleggjandi, sjálvt um tað ganga eini 6 til 8 ár, áðrenn nøkur olju kemur upp úr undirgrundini. Vónirnar til eina mennandi framtíð fara at gera, at vit longu í ár fara at fáa økt virksemi. Forvæntningarnar til komandi inntøkur frá hesum oljufundinum fara at síggjast aftur alla staðni í samfelagnum.

Wilhelm Petersen óttast ikki, at vit skulu fáa ein yvirupphitaðan búskap. – Tað eru vit sjálvi, sum skulu stýra hesum, og tað ivist eg ikki í, at vit megna. Men tað er greitt, at hetta fer at fáa stóra ávirkan á samfelagið. Sjálvur haldi eg tó, at tað er gott, at vit fáa ein meira fjøltáttaðan búskap, hóast tað gongur væl í dag. Vit síggja nakrar spírar, sum vónandi koma at bera frukt. Taka vit virksemið hjá Atlantic Petroleum, so stavar virðisvøksturin ikki úr Føroyum, men frá tí virksemi, sum vit hava í útlandinum. Tvs. at tú hevur økt um ognina hjá føroyskum partaeigarum við millum 400 og 500 mió. kr. Tað er ein beinleiðis innspræning uttanífrá, og tað sama kann eisini fara at henda komandi árini.

# Føroyingar báðumegin borðið í oljutilgongdini



*Rúni Hansen, stjóri hjá Statoil her saman við Jákup Øregaard og John Petersen, sum starvast hjá Statoil sum leiðandi boriverkfrøðingur og fíggjarstjóri. Teir koma at hava týðandi leiklut í komandi Brugduboringini*

*Mynd Jan Müller*

**– Heilt aftur frá Ráðleggingarnevndunum, sum løgdu grundarlagið undir oljutilgongdini, hevur verið víst á týdningin at fáa føroyingar við inn í nýggju vinnuna, soleiðis at vit frá byrjan kunnu fáa kunnleika til hesa vinnu og gerast partur av henni. Tí spyrst nakað burtur úr, er tað bæði skilagott og rætt, at tað eru føroyingar, sum eru við. Føroyingar føla mest fyri hesum samfelagnum, og tá er tað gott bæði fyri myndugleikarnar og fyri oljufeløgini at hava føroyingar báðumegin borðið**

BRUGDUBRUNNURIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Nú fyrireikingar til boringina á landgrunninum í summar eru í gongd á álvara ætlar fyristøðufelagið Statoil at tryggja sær, at so nógv av virkseminum og arbeiðinum sum til ber verður gjørt av føroyingum og í Føroyum. Hetta er eisini tað, sum føroysk lóggáva leggur upp til, og hetta er sambart Rúna Hansen, stjóra í Statoil, eisini tað, sum Statoil sum felag leggur stóran dent á.

– Avgerðirnar skulu takast her og virksemið skal vera her í landinum sambart føroyska lóggávu. Alt arbeiðið í sambandi við boringina verður koyrt úr Føroyum. Rúni Hansen heldur sjálvur, at tað eisini er nógv best at vera á staðnum lokalt.

Á Statoilhøvuðsstøðini á Bryggjubakka í Havn hava tey úr at gera í hesum døgum, nú tað bert eru fýra mánaðir, til borurin verður settur í á Brugdumiðinum á landgrunninum. Rúni Hansen, stjóri sigur, at boriumsóknin varð latin Jarðfeingi í farnu viku. Nú hava myndugleikarnir so nakrar mánaðir at eftirhyggja og gjøgnumganga umsóknina og harvið at tryggja sær, at alt er, sum tað skal vera. Áðrenn Statoil fer í gongd av álvara skulu myndugleikarnir góðkenna boringina.

## Vilja bora í ár

Blaðið spurdi Statoilstjóran, um ikki fyritøkurnar, sum skulu bjóða uppá ymsu uppgávurnar, fáa heldur stutt skotbráð at umrøða seg í?

– Støðan er tann, at tað hevur verið sera trupult at fáa fatur í boripalli. Vit vóru kortini so mikið hepnir, at vit fingu ein pall, men tað var tó ikki fyrr enn í desember. Tað var eisini eitt ynski bæði frá okkum sjálvum og frá føroyskum myndugleikum, at brunnurin varð boraður í ár og ikki bleiv útsettur. Vit kundu sjálvandi fingið meiri tíð, um vit bíðaðu til í 2007. Tá høvdu øll havt betri tíð til fyrireikingarnar. Men tað er tó einki at ivast í, at fyri Føroyaøkið er tað betur, at vit bora í 2006. Talan er annars um ein brunn, sum feløgini hava bundið seg til at bora helst innan 2006. Og tí verður trýst á nú, og tað er so heldur einki óvanligt í tí.

Hjá Statoil eru tey annars við at rigga seg til komandi boringina. Tey vera eini 20 fólk tilsamans bæði undir fyrireikingini og undir sjálvari boringini. Umframt Statoilteamið, so koma eisini nakrir mans, sum hoyra til sjálvan boripallin, at vera á Statoilhøvuðsstøðini og fylgja boringini hagani.

Borurin verður eftir ætlanini settur í hálvan juli og er boringin mett at vara í einar tríggjar mánaðir. Talan er um at bora einar 3800 metrar, harav umleið 1000 metrar eru basalt. Vit fáa ikki upplýst samlaða kostnaðin at bora, men Sosialurin skilur, at tað fer kanska at kosta upp til hálva milliard krónur at bora henda brunnin.

Rúni Hansen sigur annars, at teir síggja hetta at skula bora gjøgnum basalt sum eina stóra avbjóðing. Talan er sum so um ein "high-risk" brunn, eisini tá talan er um sjálva boringina gjøgnum basalt. Hetta er ein sokallaður "Wildcat" brunnur, sum liggur langt frá øðrum brunnum. Váðin er stórur soleiðis at skilja, at sannlíkið fyri, at vit einki finna er avgjørt til steðar. Men vit bora ikki uttan, at




*Stena Don, sum fer at bora Brugdubrunnin í summar*

*Mynd Statoil*



vit halda tað er møguleiki fyri at finna olju. So má bara tíðin vísa, hvat tað verður til leggur hann aftrat.

Sum nevnt leggur føroysk løggáva upp til, at føroyingar eru við í arbeiðinum og at arbeiðið verður gjørt í Føroyum í tann mun tað ber til, og hetta er nakað, sum Statoil tekur í størsta álvara.

– Vit royna at fáa kvalifiserað fólk til uppgávurnar og er tað so, at tað eru føroyingar í Statoilskipanini, sum eru kvalifiseraðir til at taka sær av hesum uppgávum, so er greitt, at vit vilja brúka teir. Í hesum sambandi hava teir eisini fingið onkran føroying, sum arbeiðir hjá Statoil í Noregi til Føroya at vera í einum av lyklastørvunum. Jákup Øregaard úr Havn er settur sum leiðandi boriverkfrøðingur á Brugduverkætlanini.

Statoil hevur eisini sett enn ein føroying, John Petersen úr Fuglafirði til at taka sær av øllum tí fíggjarliga partinum av virkseminum í Føroyum. Djóni Weihe úr Havn er settur sum ráðgevi innan heilsu, trygd og umhvørvi.

### Føroyingar við frá byrjan

– Hví hevur tað so stóran týdning at fáa føroyingar í lyklastørv í sambandi við eitt nú borivirksemið?

– Heilt aftur frá Ráðleggingarnevndunum, sum løgdu grundarlagið undir oljutilgongdini, hevur verið víst á týdningin at fáa føroyingar við inn í nýggju vinnuna, soleiðis at teir frá byrjan kunnu fáa kunnleika til hesa vinnu og gerast partur av henni. Tí spyrst nakað burtur úr, so er tað bæði skilagott og rætt, at tað eru føroyingar, sum eru við. Føroyingar føla mest fyri hesum samfelagnum, og tá er tað gott at hava føroyingar báðumegin borðið. Tað er gott bæði fyri myndugleikarnar og fyri oljufeløgini soleiðis at man skilur, hvat tað er man tosar um, bæði umhvørvisliga og fakliga á øllum økjum.

– Statoil hevur tann politikk alla staðni har vit eru, at vit mugu taka hædd fyri teimum lokalu áhugamálunum. T.d. tá talan er um Norðurnoreg, so verður gjørt nógv fyri at tosa við fiskivinnuna og arbeiða saman við henni. Vit taka útgangsstøði í tí samfelag vit arbeiða í og royna at loysa trupulleikar har frá.

# Fuglfirðingur stýrir Statoil fíggjarliga

**Við at taka uppgávur heim og seta føroyingar til at umsita tær fær umsitingin í Føroyum størri vitan og royndir, soleiðis at talan verður í stóran mun um eina verkætlan, sum verður stýrd úr Føroyum sigur John Petersen, sum stendur á odda fyri fíggjarliga partinum hjá Statoil undir leiting eftir olju og gassi**

BRUGDUBORINGIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

John Petersen er enn ein av føroyingunum í nýggja Statoilteaminum í Føroyum, sum hevur fingið til uppgávu at finna olju í undirgrundini. Hann er fuglfirðingur og er vorðin headhuntaður til krevjandi og spennandi uppgávuna at taka sær av øllum tí umsitingarliga og fíggjarliga virkseminum hjá "Statoil Exploration Faroes", sum í dag er eitt av teimum mest virknu oljufeløgunum í Føroyum. Hann hevur drúgvar royndir og arbeitt sum grannskoðari síðani 1988 hjá KPMG, nú Spekt. Í tí sambandi hevur hann verið í Keypmannahavn í átta ár. Hann kom heimaftur til Føroya í 2000 og byrjaði hjá Statoil í oktober sum fíggjarleiðari.

John heldur tað eisini vera ein góðan útvikling, at føroyingar í størri mun koma at taka sær av uppgávum í oljutilgongdini her heima og vísir til, at Statoil í Føroyum tískil hevur tikið nógvar uppgávur heim, sum fyrr hava ligið í Stavanger og í London, soleiðis at man nú kann hava sjálva stýringina tættari uppat einum, bæði viðvíkjandi roknskapi og umsiting av starvsfólki, samband við myndugleikar ol. Tvs. at fíggjarstýringin og stýringin av loyvisroknskapunum og alt hartil hoyrir kemur nú alt at liggja í Føroyum.

Henda gongdin ger, at umsitingin í Føroyum mennist og fær størri vitan og royndir, soleiðis at talan verður í stóran mun um eina verkætlan, sum verður stýrd úr Føroyum. Men skal tú brúka serfrøðingar til ymsar uppgávur so kanst tú brúka fólk í Statoilskipanini. –Vit blíva ikki serfrøðingar, tí vit hava fá fólk, sum skulu røkka víða. Men vit kunnu klára nógv í samstarvi við baklandið, bæði í Stavanger og London.

Sjálvur heldur John tað fakliga vera eitt sera spennandi og avbjóðandi starv hann hevur fingið litið upp í hendi. – Tá man er við til at taka avgerðir, so er tú við til at hava ta ábyrgdina eisini í mun til, tá man í ráðgevandi støðu skal geva góð ráð, sum onnur skulu liva við.




*John Petersen og Jákup Øregaard hava alla orsøk til at líta frameftir, nú teir eru týðandi partur av avgerandi boring*

*Mynd: Jan Müller*

# Havnarmaður týðandi lut í boring í summar

**– Tað verður ein stór avbjóðing at skula bora gjøgnum 1000 metrar av basalti, men vit hava ment hesa tøknina seinastu trý árini, so eg havi álit á, at vit megna uppgávuna sigur Jákup Øregaard úr Havn, sum er settur leiðandi boriverkfrøðingur í sambandi við boringina í summar**

BRUGDUBRUNNURIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað verður havnarmaðurin og verkfrøðingurin Jákup Øregaard, sum fær stóru og ábyrgdarfullu uppgávuna at vera leiðandi boriverkfrøðingur, tá borað verður á landgrunninum í summar. Jákup er útbúgving byggiverkfrøðingur í Danmark, men hevur eftir tað útbúgvið seg víðari innan oljuvinnuna. Eitt stutt skifti eftir útbúvingina var hann í Føroyum, før síðani til Aberdeen at arbeiða hjá BP og higani til Noregs at arbeiða fyri Saga Petroleum, Hydro og til endans Statoil. Har hevur hann verið í tvey ár. Nú er hann so komin heim á klettarnar at vera við í tí sera stóru boriverkætlanini Brugduni.

Jákup byrjaði hjá Statoil í Føroyum í februar. Hann skal leggja til rættis tøkniliga partin í sambandi av boringini av Brugdubrunninum. Og tað er ikki bara sum at siga tað. Hetta verður higartil mest krevjandi og kostnaðarmikla boring á føroyskum øki. Jákup Øregaard fer at arbeiða undir Oddvar Bø, sum er leiðari fyri allari verktætlanini.

Hann er fegin um at hava fingið litið hesa stóru uppgávu upp í hendi og fer eindømi fyri Statoil at skula undir hana við opnum sinni.

– Hetta er ein sera spennandi uppgáva, og tað er eisini bora gjøgnum so nógv basalt, so tað er avgjørt ein stór avbjóðing, bæði tøkniliga og uppá aðrar mátar. Vit eru spentir at koma í gongd og síggja, um vit megna tað. Jákup sigur, at tey hjá Statoil hava arbeitt við at bora gjøgnum basalt í eini 3 ár. Eitt rættiliga stórt arbeiði er gjørt fyri at kvalifisera henda partin, soleiðis at tað ber til at megna uppgávuna.

– So tit hava gjørt tykkara heimaarbeiði?

– Tað hava vit, men tað er sjálvandi ikki lætt at vita júst, hvussu fer at ganga, tá tú skal bora gjøgnum túsund metrar av basalti fleiri kilometrar niðri í jørðini. Men vit hava so gjørt heimaarbeiðið so gott sum til ber. Royndirnar aðrastaðni at bora gjøgnum basalt eru so mikið góðar, at vónirnar til at tað eisini skal ganga væl her eru stórar.

Statoil hevur so verið við til at víðari menna tøknina, sum skal til fyri at kunna gjøgnumføra hesa boringina gjøgnum tjúkt og hart basalt.

Jákup Øregaard fegnast eisini um, at Statoil leggur seg eftir at brúka føroyska arbeiðsmegi, tá farið verður undir uppgávur í føroyskum øki.

# ingin



*Finski útbúgvingarhátturin verður róstur*

verða heilt í front. Fokus skal tá ikki bert verða á hægri útbúgvingar, men eisini tey fyrstu skúlaárini. Mett verður at tað er neyðugt at broyta tí stirvnu evropeisku skipanina, soleiðis at útbúgvingarstovnar gerast meira frælsir, og her verður Finland brúkt sum eitt gott dømi. Í stuttum verður sagt at útbúgvingarskipanin skal gerast smidligari, effekivari og lættari atkomilig hjá øllum.

### Lívslong læra

Víst verður eisini á, at neyðugt er við Lifelong Learning, soleiðis at skipast skal fyri at fólk alt lívið fáa eftirútbúgvingar og skeið,, og at tað er avgerðandi neyðugt í einum kunningar- og vitanarsamfelagi.

Hetta er neyðugt, staðfestir frágreiðingin, og tí verður framtíðar effektivi búskapurin tann sum framleiðir mest kunning og vitan, og samstundis og ger hesa kunning og vitan lætt atkomuliga fyri flest møgulig virkir og einstaklingar.

### Føroyar

Frágreiðingin er eisini áhugaverd fyri Føroyar, tí hon vísir á hvussu stóran týdning tað hevur at útbúgvingar verða raðfestar. Men hon vísir eisini á, at talan er ikki bert um at brúka pengar, men heldur at gera smidligar skipanir, sum eisini tryggja at kreativitetur ikki fer fyri skeyti.




*Suðurkoreanski forsetin Roh Moo-hyun og forsætismálaráðharriin Lee Hae-chan standa á odda fyri eini fyrimyndarliga framgongd. Sambært rágreiðingini er vøksturin og meningin í Suðurkorea neyvt tengt at útbúgving*

Í føroyskum høpi merkir tað helst, at framtíðar kappingarføri eisini er tengt at tí kreativiteti, sum ein dynamisk mentan gevur samfelagnum. Tí er m.a.Musikkskúlin ein partur av hesi menning av samfelagnum.

### Føroyskur fyrimunur

Føroyar hava tann fyrimun, at støddin ger at landið hevur ein innbygdan fleksibilitet. Men hinvegin so ger støddin eisini, at flestu hægru útbúgvingarnar verða nomnar uttanlands, og tí uttanfyri føroyska politiska ávirkan. Men nógvar útbúgvingar eru í Føroyum, og tær mugu støðugt tillagast krøvum og broytingum, sum eru. Kappingin verður ikki bert frá Kina og India. Alt ES ætlar sær upp í hægri gear, og í hesi menningarbylgju skulu vit finna okkara serøkir. Krøvini til okkara eru eftir míni tykki tey somu, sum OECD setir Evropu. Útbúgving og betring af útbúgvingum og skipanum, og ikki minst eftirútbúgvingar, sum í Føroyum als ikki hava nakra raðfesting. Tann fleksibilitetur, sum Føroyar hevur, er kanska størsti fyrimunur okkara, og skal hann eisini gagnnýtast, skulu vit verða millum heimsins fremstu í 2015.

## Atlantic fellur

Atfinningarnar móti íslendska virðisbrævamarknaðinum tykjast eisini hava rakt partabrævið hjá Atlantic Petroleum.

Eftir eksplosiónslíknandi hækkanina, sum kom eftir eina analysu hjá Eik-bank, hevur kursurin á partabrævinum støðugt verið um nakað oman fyri tey 700, men seinastu tvær vikurnar hevur talan tó verið um fall á kursinum.

Atfinningarnar, sum hava ljóðað úr eitt nú donskum peningastovnum, hava fingið fólk at vera meira varin á marknaðinum, og hækkandi útboðið og minkandi eftirspurningurin á íslendskum partabrøvum sum heild hava trýst eina príslækking ígjøgnum.

Við dagsenda í gjár var miðalkursurin á partabrævinum fallin niður á 664, sum tó er ein lítil hækkan í mun til undanfarnu vikuna. Lægsti miðalkursurin hevur her verið 652. Samlaða virðið á partafelagnum var tá uppgjørt til 488 mió kr. Tá virðið var størst – tað var tað tann 20. januar – var hetta 561 mió kr.

**-mørk**




*Partabrævið hjá Atlantic Petroleum er lækkað nakað í virði tær báðar seinastu vikurnar*

*Kelda: www.vmf.fo & www.icex.is*

## Avkastið til landskassan 40,5 mió. kr. í 2005

**Ársroknskapur Landsbankans er nú almennur og vísir hann, at bruttoinntøkur landsbankans í 2005 vóru 71,3 mió. kr. Av hesum vóru bruttorentuinntøkurnar 70,2 mió. kr, sum er 5,4 mió. kr lægri enn í 2004**

ROKNSKAPUR
*tíðindaskriv*

Nettorentuinntøkurnar vóru fyri 2005 36,6 mió. kr., sum er ein hækking við 8,2 mió. kr. sammett við 2004.

Kursjavnan av virðisbrøvum var -14,0 mió. kr. í mun til -6,8 mió. kr. í 2004.

Nettoinntøkur bankans áðrenn umsiting og avskriving, men íroknað kursjavnan av virðisbrøvum, vóru 23,8 mio. kr, sum vóru 1 mió. kr. hægri enn í 2004.

Rakstrarútreiðslurnar vóru 7,9 mió. kr. í mun til 7,5 mió. kr. í 2004 og vóru avskrivingarnar á sama støði sum í 2004.

Hetta gevur eitt yvirskot av rakstrinum uppá 15,8 mió. kr. í mun til 15,2 mió. kr. í 2004.

Nettoavkast bankans av øllum íløgum er uppgjørt til 2,9% í 2005. Avkastið av lánsbrævaíløgunum var 2,9% og peningamarknaðaríløgunum 2,2%.

Miðalinnistandandi hjá landskassanum var 1.527 mió. kr. Landskassin fær rentu og rest av avlopi bankans eftir at lagt er í tiltaksgrunn og ábyrgdarskylduskjalið er niðurskrivað. Soleiðis hevur landskassin í 2005 fingið kr. 27,9 mió. kr. í rentu og 11,9 mió. kr. av avlopi bankans. Íroknað niðurskriving av ábyrgdarskjalið á 0,7 mió. kr. var avkastið til landskassan tilsamans 40,5 mio. kr. í 2005.